# Vit sum fóru í skúla í 1967 á Ziskatrøð







**Nú hittast vit aftur - 40 ár eftir fyrsta skúladag - tann 21. juli 2007 Byrja verður kl. 10.00 við at øll møtast í skúlagarðinum á Ziskatrøð. Um kvøldi verður veitsla á hotel Norð.**

**Set teg í samband við okkum, óansæð um tú kanst luttaka ella ikki. Vit vilja fegin frætta frá tær og greiða tær nærri frá tiltakinum. Ring til Elin K. Matras tlf. 45 50 94 / 28 50 94 ella send ein teldupost til abraham@kallnet.fo**

# Baðiland til fólkið



*Enn er ikki klárt, men arbeitt verður av øllum alvi at gera svimjihøllina klára. Í farnu viku vóru menn framvegis til arbeiðis, og var leiðarin torkil Mørkøre í ferð við at spula í baðilandinum.*

*Mynd: Høgni Thomsen*

Tá nýggi leiðarin, Torkil Mørkøre tók við starvinum í svimjihøllini í Klaksvík á heysti í fjør, lovaði hann at svimjihøllin skuldi gerast meiri sjónlig.

Longu nú eru fleiri broytingar framdar, meðan helst tann størsta verður liðug í næstum: Ætlanin um eitt baðiland í Klaksvík.

Arbeitt hevur verið við hesum eina tíð, og nú er komið so mikið langt at ein sær skapið av tí, sum uttan iva fer at fáa klaksvíkingar, norðoyingar og onnur at leita sær hagar í hópatali.

Endamálið við hesum er at veita teimum vitjandi eina betri tænastu og soleiðis økja enn meiri um talið á teimum, ið fara at vitja svimjihøllina.

**sb.**

## Spennandi skrá í KFUM&K

Komandi vikuskiftið verður Norðoyastevna í Klaksvík. Hóast bygdastevnurnar eru nógv minkaðar, eftir at festivalarnir komu, so eru bygdastevnurnar framvegis fyri at stuðla ítróttinum og teimum smáu feløgunum. Eisini í KFUM & K í Klaksvík verður nógv ymiskt á skránni um vikuskiftið

Skráin fyri tiltøkini í KFUM & K byrjar kl. 22, tá Opið Hús er á skránni.

Á midnátt leygarkvøldið verður Café við livandi tónleiki. Framførslur verða m.a. við Jan, Erlu, og Ari. Eisini verður kaffi, køkur, suppa og annað at fáa.

Sunnudagin kl. 14.30 verður ein serstøk Café við barnasangi og kl. 18 møti

Kl. 21 er ungdómsmøti har Erik Wengel, missiónsskrivari hjá Dansk Ethioper Mission (DEM) fer at tala.

**sb.**